# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Nøkur minningarorð um Marit Persson



Tað kom mær ógvuliga dátt við, tá ið eg hoyrdi, at Marit var farin frá hesum foldarheimið.

Væl visti eg at hon var sjúk, men tað verður tó ikki altíð hugsa um, at deyðin kann vera so skjótur á gátt hjá einum og hvørjum av okkum.

Eg kom at kenna Marit, ja heilt frá ungdómsdøgum av á Tvøroyri, og seinni tá vit báðar fluttu norð um fjørð at búgva, tá komu vit oftani saman bæði til gaman og álvara. Og ikki at gloyma allar tær hugnaligu uttanlanda ferðirnar, hvar vit kundu nýta tað góða veðrið og vera saman við glaðum og góðum fólkum.

Men nú til seinast møtti tú ikki so oftani við, vegna ta ringu heilsuna. Eg komi ongantíð at gloyma, hvussu trúgv tú var at vitja meg, tá ið eg lá á hvíldarheiminum.

Nú er Marit farin heim til Jesus, har hon bíðar eftir sínum kæru.

*Eg sigla man yvir lívsins hav,*
*meg ber hin skiftandi bylgja,*
*Mín Harri Jesus, hann kós mær gav,*
*og hesi kós vil eg fylgja.*
*Eg stevni fram at teim ljósu londum,*
*við lívsins træi á føgrum strondum,*
*har altíð sól og summar er.*

Friður verið yvir minni hennara.

**Justa**

Regin Vágadal, Tórshavn:

## Leiðari á Rakstrardeildini hjá Strandferðsluni



Regin Vágadal er settur sum nýggjur leiðari á Rakstrardeildini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Regin hevur verið fyribils settur rakstarleiðari í hálvtannað ár.

Regin Vágadal er 34 ára gamal og útbúgvin skipsførari og hevur merkonomútbúgving innan fyrisiting.

## Andlát

24. november
Olivar Danielsen á Velbastað, vanliga nevndur Gode, 82 ár.

26. november
Alma Samsonsen, fødd Midjord, ættað úr Fuglafirði, búsitandi í Keypmannahavn, 70 ár.
Jacoba Nielsen í Sandavági, ættað úr Rituvík, 92 ár.

27. november
Karl Heinrich Soll, vanliga nevndur Kalle, í Sørvági, 53 ár.
Hermann Joensen, ættaður úr Hósvík, 81 ár.
Niels Peter Madsen, Keypmannah., sonur Magnus Madsen, Havn, 49 ár

28. november
Anna Jensen, Hellurnar, 95 ár.
Edgard Højgaard, av Toftum, 70 ár.
Sólarn Solmunde í Syrðugøtu, 78 ár.

29. november
Laurina Hansen, vanliga nevnd Ninna, ættað úr Kollafirði, 75 ár.
Dávur Gudmundsson Isfeldt, Tórshavn, 44 ár .
Sevilda Joenen, fødd Jacobsen, 75 ár.
Birgir Nónsgjógv, ættaður frá Gjógv, búsitandi innan Glyvur, 51 ár.

30. november
Mia Fagranes, Runavík, 93 ár.

## Dagurin

**4. desember. Barbara**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at tann vakra gentan varð vorðin kristin, og heidni faðir hennara stongdi hana inni í einum torni. Hon vildi ikki ganga frá trúnni, og at enda læt faðirin sjálvur hana hálshøgga.

Navnið er grikst og merkir *fremmand*.

**5. desember. Sabina**. Nógvar halgikvinnur bera hetta navn, men eingin tykist at hava samband við henda dag. Hildið verður tí, at talan er um tann halga mannin Sankta Sabas, ið er kendur kleysturbyggjari í Palestina. Hann doyði umleið ár 532.

**6. desember. Nikolaus**, deyður umleið ár 350. Hann var biskupur í Myra, sum er í Lítlaasiu. Hann varð tikin av døgum sum pínsluváttur, men við grøv hansara í Myra hendu so mong undurverkini, at hann skjótt varð roknaður sum halgimenni.

*Niklasar*- ella *niklasmessa* hevur verið hildin í Føroyum. Og ein gomul føroysk vísa er um Niklas, har niðurlagið er: *Hjálpi mær Guð og ríki harrin, Sankta Niklas.*

Í Hálandi varð hann róptur Sinte Klaas, og haðani kom dyrkanin til Amerika, har hann varð Santa Claus, sum gevur børnunum gávur á jólum og er tann sami, sum nú á døgum verður róptur jólamaðurin.

Navnið er upprunalga grikst, sett saman av orðunum nike ið merkir sigur og *laos*, ið merkir fólk.

*A.C. Evensen varð føddur hendan dagin í 1874.*

### 90 ára føðingardagur

Hans Jacob Johannesen, skipari í Havn, fyllir 90 ár týsdagin 7. desember. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Johan Restorff 65 ár

Mánadagin 6. desember fyllir Jóhan Restorff í Havn 65 ár. Í hesum sambandi eru fólk vælkomin á Parnassið á Hotel Hafnia millum kl. 9–12 at hitta Jóhan og fáa sær ein drekkamunn.

### Gullbrúdleyp

Í dag, 4. desember hava hjúnini Hansa og Benjamin (Benni) Joensen í Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Brúdleyp

Í dag, 4. desember kl. 10.00 giftast í býráðssalinum í Havn Randi Fjallsá, Tórshavn og Andras Nolsøe, Trongisvágur. Brúdleypsveitslan verður í Pálsstovu kl. 13.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Prógv

Niels Uni Dam hevur fingið kandidatprógv í samskifti við Roskilde Universitetscenter.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermóðir, omma, langomma og olduromma okkara.

**Mia Fagranes**
**Runavík**

andaðist á Runavíkar Røktar og Ellisheimi týsdagin 30. november, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Erling, Jenny og Tordis**

†

Kunngjørt verður fyri slekt, vinum og kenningum, at kæri beiggi okkara

**Daniel Johann Poul Sigurd Joensen,**
**skipsførari,**
**ættaður frá Gjógv**
**búsitandi í Nordby á Fanø**

andaðist mikudagin 1. desember 73 ára gamal.

Jarðarferðin verður týsdagin 7. desember kl. 13.00 úr Nordby kirkju.

*Familjunnar vegna*

**Poul Johannes og Hans Jacob Joensen**